tíðindablaðið sosialurin
Postsmoga 76,
3800 Argir,
telefon 11820
Útgevari: p/f sosialurin
Fyritaksstjóri og blaðstjóri: Tórfinn Smith (ábyrgd)
Blaðfólk: Høgni Djurhuus, Dagny Joensen, Jóhann Mortensen og Jan Müller
Lýsingar: Árni Joensen
Uppseting: p/f sosialurin. Prent: p/f pressan 1981

Munur á prioritering

oddagrein

MÁLIÐ um royndarstøð og landbúnaðarskúla er komið fram í ljósmála aftur. Hetta mál hevur nú aftur verið til viðgerðar í fíggjarnevndini, men kom ikki longur, tí Sjálvstýrisflokkurin er ikki sinnaður, at fremja málið í løtuni.

ANNARS er landsstýrið av teirri áskoðan, at nýggja royndarstøðin skal liggja í Kollafirði. Hesum eru ikki allir menn samdir við landsstýrið um. T.d. hevur Janaðarflokkurin fyri ári síðani lagt uppskot á ting um, at royndarstøðin verður bygd á Sandoynni.

TAÐ VERÐUR so ofta talað um bygdamenning og decentralisering. Í hesum føri er so ómetaliga nógv ið talar fyri, at leggja hesa royndarstøð á Sandoynni. Sandoyggin er best egnaða oyggin til landbúnað og harafturat er ógvuliga avmarkað hvat annað av almennum virksemi kann leggjast har í oynni.

TAÐ ER bert harmiligt, at eitt tílíkt mál, sum hevur við landbúnaðin at gera, fær eina tílíka viðferð. Í staðin at savnað krefturnar um at fáa sum frægast burtur úr hesi vinnu og útbyggja hana, er hetta vorðið eitt klandursmál um hvar støðin skal liggja. Harafturat verður hetta mál nýtt í taktiskum politiskum spæli. — Ein politisk handilsvøra.

ER TAÐ veruliga ikki gingið upp fyri monnum enn, hvussu stóran týdning landbúnaðurin í Føroyum kann fáa, og hvørjir møguleikar eru í honum?

HER ER talan um matvørur okkum tørvar. Her er taln um kjøt, epli, mjólk o.s.fr. — dagligur kostur til føroyska húsarhaldið, ístaðin fyri íslendskt kjøt, hálendsk epli ella Matildumjólk. Tað er ómakaleysari at innflyta, men neyvan klókari landsbúskaparliga.

MÁLIÐ UM byggjan av landbúnaðarskúla og royndarstøð er meir enn hundrað ára gamalt. Vit eru ikki komin málinum nærri eftir hundrað árum. At byggja nýggjan studentaskúla tók bert tveir mánaðar at viðgera á tingi, og gott var at hann kom, men samstundis má ein ásanna at her er sanniliga munur á prioritering.

Viðmerking til J. Sundstein

Í Sosialinum seinasta leygardag leggur Jógvan Sundstein hinar samgonguflokkarnar undir at tarna málum teir umsita: bergholsgerð, helikoptaraflúgving og millumlandasigling.

Tá hevði verið áhugavert, um fólkaflokkurin í verki hevði víst, at hann kundi spart pening á nevndu útreiðslugreinum til annað, so hesi mál hansara kundi verið vunnin. Tað er tvørturímóti. Alt, ið er játtað á fíggjarlógini, er brúkt og nógv afturat.

Seinasta fíggjarár varð brúkt tvær ferðir so nógv, sum tað, ið var játtað til samferðsluna.

Jógvan Sundstein sigur eisini, at Sjálvstýrisflokkurin er ímóti, at tað almenna stuðlar skip og virki, sum eru komin í trongstøðu. Hetta er ikki rætt. Sjálvstýrisflokkurin hevur í nógvum førum tikið undir við slíkum tiltøkum, men tað er aðalmunur ímillum okkum og hinar báðar samgonguflokkarnar. Sjálvstýrisflokkurin krevur, at tann, ið vinnuna eigur, skal vísa, at hann saman við landinum tekur tað tak, sum neyðugt er, og ikki bert kastar frá sær og letur landið um alt. Vit krevja fasta mannagongd lógfesta, so tann einstaki borgarin, so neyvt sum tað letur seg gera, verður eins fyri lógini, og ein treyt fyri at fáa hjálp er, at í minsta lagi tað, ið vunnið er í útsettum skatt, fyrst er komið vinnuni til góðar, áðrenn landið kann hjálpa av nýggjum.

Tær hjálpir, ið higartil eru veittar, hava verið av slíkum slagi, at ein noyðist at spyrja seg sjálvan, eftir hvørjum reglum verða tær veittar.

Í einstøkum førum er ovurhonds hjálp veitt sum lán veðhald og beinleiðis gjald úr landskassanum, uttan at nakað er kravt frá eigarunum, meðan í øðrum førum hava eigararnir fingið heilt aðra viðferð.

Hilmar Kass

Aftursvar til »Ein av teim 19«

Til lesarabræv í Dimmalætting hósdagin tann 1. september 1982 undirskrivað »Ein av teimum 19«, loyvir undirritaði sær at gera hesa viðmerking:

Undirritaði hevur ikki brotið nakra tagnarskyldu í sambandi við arbeið mítt í sjónvarpsnevndini. Eg havi ikki upplýst navn á nøkrum umsøkjara til sjónvarpsstjórastarvið fyri Sosialinum ella nøkrum øðrum. Eg havi biðið Sosialin siga frá, at eg ikki eigi lut í hasum tíðindunum, og tað vóni eg, at teir gera.

Upplýsast kann eisini, at undirritaði hevur tosað við ein fulltrúa í landsstýrinum, sum veit hvaðan tíðindini eru, og hann kann vátta, at undirritaði ikki er uppruni til teirra. Um »Ein av teimum 19« vil hava tað váttað frá hesum fulltrúa, so kann hann ringja ella skriva til mín, so skal hann fáa samband við viðkomandi fulltrúa.

»Ein av teimum 19«! Tygum hava í brævi tyggara ákært undirritaða fyri at hava gjørt brot á tagnarskylduna og alment mistonkt meg fyri at hava kunngjørt nøvnini á umsøkjarum til sjónvarpsstjórastarvið fyri Sosialinum.

Hetta eru grovar skuldsetingar, og tá tygum nú hava hugsað tygum um, so áttu tygum at komið við eini umbering.

Undirritaði hevur als ikki brotið tagnarskylduna. Tvørturímóti havi eg greitt Føroya landsstýri og Føroya fólki frá, hvussu eg meti, at innstillingin frá nevndini eigur at skiljast. Henda meting er gjørd út frá arbeiðnum í nevndini, og tí mátti greiðast frá, hvussu hetta arbeiði fór fram. Eg havi bert sagt og skrivað veruleikan og hann mátti kunna tolað dagsins ljós.

Undirritaði hevur ongan umsøkjara nevnt við navni uttan teir tríggjar, sum eru innstillaðir av nevndini. Harafturímóti hevur nevndarformaðurin longu sama kvøldið fyri útvarpinum nevnt tríggjar umsøkjarar, ið als ikki eru innstillaðir. So um nakar nevndarlimur kann sigast at hava brotið tagnarskylduna, so er tað møguliga formaðurin.

Vinarliga
Hans Jørgensen

NB. Undirritaði fer ikki at siga seg frá sum nevndarlimur í sjónvarpsnevndini, men fer framvegis at arbeiða í nevndini í sama positiva anda sum higartil. Eg fari framvegis ikki at kunngera persónlig viðurskifti hjá t.d. einum umsøkjara, men eg fari at siga frá á rætta staði, um eg meti, at nakað óregluligt fer fram í nevndini.

H.J.

Útvarpið heldur við NATO!

Fyri ikki so langari tíð síðani endurgav Sosialurin partar av grein í danska blaðnum Information, har víst varð á, at Føroyar avgjørt eru bumbumál, um kriggj brestur á millum eystur og vestur.

Í tíðarritinum Brá, sum kom út fyri stuttum, stendur grein at lesa um Føroyar í kjarnorkuvápnadubbingini. Har verður eisini sagt, at Føroyar eru eitt sjálvsagt bumbumál í krígsstøðu, og at vit sum fólk og tjóð eru hótt.

Tílíkar greinir letur Dagblaðið sjálvandi ikki fara aftur við borðinum. Í pro-natoistiskari greinarøð hevur blaðið havt samroðu við NATO-ovastar í Føroyum, og teir bedýra, at í Føroyum kunnu vit vera trygg, og at higar koma eingir hermenn, uttan so at landsstýrið hevur givið loyvi til tess. (Hvat skuldu teir annars sagt? Teirra uppgáva er jú m.a. at sissa antimilitaristar).

Men hvat ger so útvarpið? Jú, greinirnar í Sosialinum og í Brá verða ikki nevndar, meðan útvarpið ber fram stórtíðindi um at Føroya ikki eru bumbumál, sambært Dagblaðnum, og stórur partur av dagblaðsgreinini verður lisin upp. Uttan viðmerkingar av nøkrum slag.

Sjálvsagt átti útvarpið at nevnt hinar greinirnar í sama viðfangi og at biðið um viðmerkingar frá t.d. Kvinnum fyri Friði, Fólki fyri Friði o.ø. Tað hevði eisini borið til at spurt t.d. Erlend Patursson, um hvussu tað var við føroyskari góðtøku av, at natomenn komu á land á sinni í Føroyum.

Men útvarpið valdi einans at bera fram sjónarmiðini hjá NATO — tíðindi, sum hava til endamáls at fáa fólk at tiga heldur enn at hugsa.

Og meðan friðarrørslan í restini av heiminum mennist av ótta fyri framtíðini, seta føroyingar seg væl afturá og anda lættliga. Í NATO sín vilja. Útvarpið hjálpir teimum.

Friðardýr

Rættleiðing til Birgir Mohr

Í Sosialinum nr. 86 frá 2. september hevur Birgir Mohr eina viðmerking um tann rætt, Landsskúlaráðið hevur tikið sær til tað, hann sigur vera politiskar starvssetanir. Við tað at undirritaði hevur verið eitt sindur meira enn áskoðari til henda surrealistiska sjónleik í trimum aktum: 1) rektarasetan, 2) deildarleiðarastarv og 3) sjónvarpsstjórastarv — skulu ongar viðmerkingar gerast til hetta.

Men Birgir fer skeivur, tá hann sigur, at tað var nevndin, ið fyrireikaði og gjøgnumførdi yvirtøkuna av skúlaverkinum (Og sum undirritaði var formaður í), sum evnaði til lógaruppskotið um skúlafyrisiting, sum Landsskúlaráðið er ein partur av.

Yvirtøkunevndin samráddist við danskar myndugleikar um, hvussu yvirtøkan skuldi fara fram, hvussu nógv skuldi yvirtakast og fann fram til, hvørjar lógarbroytingar vóru neyðugar.

Nevndin læt frá sær álit og uppskot til 4 rammulógir, sum fólkatingið samtykti, og sum heimilaðu heimastýrinum ikki bert fyrisitingina av skúlaverkinum men eisini góvu løgtinginum rætt til at lóggeva innan fyri rammulógirnar.

Tá hetta var gjørt, var verk nevndarinnar lokið. Uppsetingina av einari føroyskari skúlafyrisiting hevði yvirtøkunevndin onki við at gera.

Men Birgir skal hava rætt í, at tað var harmiligt, at allar ætlanir við einum føroyskt stýrdum skúlaverki skuldu fara so.

Hans Jacob Debes